# H71

faldari 7

FTZ KAPPINGIN

## H71 - NEISTIN

Sunnudagin 6. mars. kl. 16.00

Hoyvíkshøllin



SUÐUROYAR SPARIKASSI

J&K

BÓNUS

P/F THOMAS DAM
ÍTRÓTTARDEILDIN · N. Finsensgøta 5 · Tel. 31 14 03

polytan

Advokatfelagið
Yviri við Strond4

Auto Service

INNI

AnniJanni

# FOKUS 18:29




## Ger tínar dreymar til veruleika

- sama um tú vilt fara undir útbúgving, ert sjómaður ella vilt spara saman til eini hús.

Fokus pakkin hevur alt tað tú hevur tørv á - NemKontu, FokusLán, FokusKreditt, Gjaldskort, Netbanka og FramtíðarKontu. Sum Fokus kundi fært tú ókeypis tænastur, lagaliga fígging og góða rentu.

**Gjaldskort** **Netbanka** **Fígging** **FramtíðarKonta**

Vitja deildina í Vági og Havn.

ss.fo

SUÐUROYAR SPARIKASSI

# Frítíðin byrjar umborð




Lætt og ómakaleyst ber til at koyra bæði Danmark, Ísland og alt Evropa upp og niður, júst tá passar tær. Við egnum bili er alt nógv lættari. Pakka viðførið í bilin, koyr umborð og njót ferðina.

Tá tú ferðast við Norrönu, kanst tú byrja at halda frí, leingi áðrenn tú kemur fram til títt frítíðarstað ella summarhús. Umborð á Norrönu kanst tú halda frí, so tað stendur eftirí.

Les meira á **www.smyrilline.fo**, skriva til **booking@smyrilline.fo** ella ring **345900**







# VERÐI HØGT TIL LOFT

**TÁ SJÓNLEIKARHÚSIÐ VARÐ VÍGT Í 1926, YRKTI SKALDIÐ H.A. DJURHUUS MERGJAÐ KVÆÐI TIL VÍGSLUNA OG HEVÐI KVÆÐIÐ HENDA MAGNANDI INNGANG:**

VERÐI HØGT TIL LOFT, VERÐI VÍTT TIL VEGGJA,
VERÐI HENDA HØLL OKKUM KYNSTURSINS BORG,
LATI VAKURLEIKAN TIL STÓRGERÐ EGGJA.

Hetta ørindi rann mær í hug, nú Tórshavnar Býráð fríggjadagin bjóðaði til móttøku í sambandi við at nýggju hølini, bygd eru afturat Hoyvíkshøllini, alment vórðu tikin í nýtslu. Alment sigi eg, tí vit høvdu fingið loyvi til at tjóðstarta í sambandi við steypafinalurnar undanfarna vikuskifti og nýta hølini sum hóskiligan karm fyri at taka ímóti og heiðra øllum steypafinaluhetjum okkara, so hvørt sum sigrarnir komu í hús. Eitt vikuskifti, ið neyvan kemur aftur í bræði. Hølini vórðu trýstroynd tá og stóðu royndina við glans.

Annars eru nýggju felagshølini sera snøgg og hugnalig. Við stórum og góðum ídnaðarkøki, góðum sýni inn á vøllin í Hoyvíkshøllini og stórum og ljósum felagshøli, ið hoyvíkingar kunnu nýta til alskins tiltøk – ikki minst í hondbóltshøpi.

Avgerandi neyðugt er fyri okkum í Hoyvík, at hava nakað at bjóða okkara børnum og ungu, skulu hesi trívast og mennast í egna nærumhvørvi okkara, heldur enn at skula leita sær oman í býin fyri at uppliva ta ungdómi nú einaferð leingist og tráar eftir *(umframt tann alt avgerandi hondbóltin sjálvsagt)*.

Vit hava, sum er, Klubb 188, sum er eitt sera væl eydnað kvøldartiltak fyri ungdómin í bygdini. Við nýggju felagshølini í Hoyvíkshølini afturat, ivist eg onga løtu í, at vit hava nøktandi karmar fyri at kunna bjóða ungu okkara tiltøk og upplivingar, ið kunnu kappast við tiltøk niðri í býnum.

Í mínum uppvøkstri, høvdu vit gamla skúla við Hvítanesvegin at búðleikast í og tað er ikki at taka munnin ov fullan, tá sagt verður, at har vóru vit ungdómar aldir upp til at sýna ábyrgd og at kunna skipa fyri tiltøkum. Har varð H71 ment av ungum fólki fyri ungdómin og har varð skipað fyri mongum tiltaki í bygdini, eitt nú sera væl umtóktu nýggjárshaldini, har bál varð brent, blikk vórðu sett upp eftir Hvítanesvegnum, røst súpan etin og dansur fyrskipaður til ljósa morgun.

Nýggju hølini í Hoyvíkshøllini, minna meg ikki sørt á ungdómsdagar mínar í gamla skúla í Hoyvík. Tá lat býráðið á sama hátt okkum høli uppí hendur at hava ungdóms- og bygdatiltøk í og sum skiltist á umboðum kommununar til hátíðarhaldið fríggjadagin, er ætlanin nakað hin sama við hesum hølum.

Vit hoyvíkingar takka býráðið hjartaliga fyri hølini og ivast ikki í, at í hesum hølum skulu hoyvíkingar nokk stórgerðir inna.



2X3 TIMBUR HT TILFAR HANDILIN

# Avatara

## Ein heilt nýggj og serstak verð innan gólv

**AVATARA**

Avatara er eitt gólv við fyrimunum frá bæði tí slitsterka laminatgólvinum og tí ektaða parkettgólvinum. Nýggja avataragólvið líkist fullkomiliga einum trægólvi, hevur træstruktur og er mjúkt og heitt, júst sum træ. Samstundis er avataragólvið líka slitsterkt sum eitt laminatgólv og krevur einki viðlíkahald. Prísurin er heldur ikki at fara skeivur av: Avataragólvið er munandi bíligari enn eitt parkettgólv.



Prísir úr 158,- fyri m²

30 ára garanti

NÓGV YMISK & SERA VØKUR MYNSTUR

- **Júst sum træ at síggja til**
- **Strukturin kennist sum træ**
- **Heitt og mjúkt at ganga á**
- **Luktfrítt og heilsugóðkent**
- **Slitsterkt sum laminatgólv**

TIMBUR HT TILFAR HANDILIN


Lundin Financials
Lundin Løn
Microsoft Dynamics
nema
nema
Trygg
fíggjarstýring
nema
SENDISTOVAN


VANILJU
KREM
Tað besta omaná
Forkela familjuna. Royn okkara
leskiliga vaniljukrem.
Nýggj vøra!
MBM
SENDISTOVAN

NordikSOLO 18+

# Kom best frá byrjan við NordikSolo

Ert tú millum 18 og 28 ár, kanst tú gerast NordikSolo kundi og fáa eina rúgvu av ókeypis tænastum og serliga góðum rentum.




Vitja www.banknordik.fo/solo og gerst NordikSolo kundi.

BANKNORDIK

SENDISTOVAN

Pf. Jógvan Weihe

P/F Jógvan Weihe | Tel: 35 38 97 | Fax: 35 38 98

www.weihe.fo | weihe@weihe.fo

P/F Hjá Fróða

Jónas Broncksgøta 25
Tel 35 09 00
Fax 35 09 01
frodi@hjafroda.fo

Flügger




LM ELECTRIC - 100 TÓRSHAVN - HOYVÍKSVEGUR 53
TEL 35 12 20 - WWW.LM.FO - LM@LM.FO

fk

Keyp ein Toyota - og fá ein 3 ára servicepakka

Ongar útreiðslur til viðlíkahald í 3 ár



REYNI SERVICE
tel. 35 30 40 - www.reyniservice.fo


Dekk
- Vit selja øll sløg og allar støddir
- Vetrardekk á sportsfelgum
- Vit hava helst besta prísin
- Góð tænasta og góðir prísir
- Bil or not to bil
- sjálvandi frá Bilrøkt!
Ring 35 88 88 og bílegg tíð
Opið gerandisdagar frá 08.00 - 17.00
og leygardagar frá 10.00 - 13.00
bilrokt.fo
Stíðjagøta 3 · FO-100 Tórshavn · Tel: 358880 · Mobil: 235880 · bilrokt@bilrokt.fo · www.bilrokt.fo


WAAG
& COMPANY
WAAG & Co. Pf
Hoyvíksvegur 63
110 Tórshavn
Tel: 31 36 66
waag@waagbilar.fo
www.waagbilar.fo
OPIÐ ER: MÁNADAG - FRÍGGJADAG: 8.00 - 17.00
WAAG
& COMPANY

vistir.fo
haraldsen






Tú fært avsláttur av inngjaldinum til tínar privatu tryggingar hjá Tryggingarfelagnum Føroyum, um tú hevur tvær ella fleiri privatar tryggingar hjá okkum. Fleiri tryggingar tú hevur, størri avsláttur fært tú.

Hevur tú inngjald til Betri pensjón á minst 10.800 krónur árliga, fært tú 20% í avslátti av tínum privatu tryggingum hjá Tryggingarfelagnum Føroyum, líkamikið um tú hevur 1, 2, 3, 4 ella fleiri privatar tryggingar.

**Tilsamans kanst tú fáa heilt upp til 32% í avsláttri**

*Set teg í samband við okkum á telefon 345600 ella tf@trygging.fo og fá eitt tilboð uppá tryggingar og pensjón.*

Betri pensjón

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

ÁTAKSTILBOÐ:
LUKSUS FAMILJUBILUR ÚR 390.000 KR




NÝGGJUR VOLVO V70 TRIBUTE
EITT SINDUR MEIRI AV TÍ GÓÐA TIL TÍN

Volvo V70 er ein sannur svenskur stationbilur. Stórur, høgligur, tryggur og sannførandi gjøgnumførdur úr enda í annan. Tann nýggi Tribute frá 2016 er veruligt skandinaviskt marglæti í teirru góðu og kendu Volvogóðskuni og við einum longum lista av útgerð. Fíggjarliga kanst tú gera kubbið júst nú bæði í mun til sjálvan bilin og í mun til útgerðspakkan. Bóka ein royndartúr hjá Wenzel

ÚR 390.000 KR

VOLVO

P/F Wenzel | Akranesgøta 5 | FO-100 Tórshavn | tel 35 45 00 | fordpost@wenzel.fo | www.wenzel.fo

WENZEL

NORÐOYA SPARIKASSI

Orkulán 2,5%

- Bústaðarlán við lágari rentu

***Bílegg eitt kundaprát***
*og fá meira at vita um fyrimunirnar við orkulánin um*



*Norðoya Sparikassi - Hoyvíksvegur 67 - FO-100 Tórshavn Tel. 47 5000 - ns@ns.fo - www.ns.fo*




**Ítróttarfelagið Hoyvík H71**
Hoyvíkshøllin, Postsmoga 1067
188 Hoyvík · www.h71.fo

**NEVND**
Sunneva Jakobsen, forkvinna
231115, sunneva@liv.fo

Gunn Ellefsen, næstforkvinna
593040, ge@lawfirm.fo

Agga Niclasen, 508689
h71faldarin@gmail.com

Anna Dam, 519082
ad@lawfirm.fo

Rene Dahl Olesen, 235930
renedahlolesen@gmail.com

Emy Sólvitsdóttir, 513769
emys@olivant.fo

Bergtóra Høgnadóttir, 286011
bergtorajoensen@gmail.com

Janet Fríða Johannesen, 212211
jjoh@olivant.fo

Randi Frederiksberg, 212000,
randi.frederiksberg@gmail.com

**ÁBYRGD AV FALDARA**
Sunneva Jakobsen,
231115, sunneva@liv.fo

**ÁBYRGD AV HEIMASÍÐU**
Agga Niclasen, 508689
h71faldarin@gmail.com

**SNIÐ, UMBRÓTING,**
**PRENT OG LIÐUGTGERÐ**
Pf. Føroyaprent, www.foroyaprent.fo
– svanamerktur prentlutur 541 705
*Forsíðumynd: Jan Sørensen*

**ÚTGEVARI**
H71


Coca-Cola
Coca-Cola
Coca-Cola
Coca-Cola


8


Coca-Cola


Coca-Cola






41
12
BONUS


9



# HIN ELEKTRISKI STÓLURIN




**Aldur**
18 ár.

**Hvørjum plássi spælur tú á?**
Høgra vongi.

**Deild?**
1. deild.

**Hvør á liðnum hjá tær er stórsta drama-queenin?**
Fía Hoydal.

**Hevur vánaligasta tónleikasmag?**
Allar hava líka vánaligan tónleikasmag.

**Hevur flottastu reyv?**
Jessica hevur hvørfall tí størstu.

**Er festligast at vera í brúsu saman við?**
Veit ikki, vit tora illa í brúsu saman.

**Hvat er tað flottasta málið, ið tú hevur skorað í einum dysti?**
Haldi aldrin eg havi skorað nakað flott mál, hehe.

**Hvør á FTZ-liðnum er lekrastur?**
Tað er eingin ivi í, at tað er John í Horni Sivertsen.

**Hevur tú nøkur ritualir áðrenn dyst?**
Nei, tíverri.

**Hvat er tín besta hondbóltsuppliving?**
Tað man nokk vera, tá ið vit vunnu okkara fyrsta og einasta dyst á PartilleCup 4-0.

**Hvør er besti leikari, ið tú hevur spælt ímóti?**
Tað má nokk vera Tórhalla Thorsteinsson, áðrenn hon fann útav at H71 faktist er eitt betri felag og flutti niðan til okkum, wuuhuu.

**Hvat fyri skoritriks hevur riggað best hjá tær?**
Tað sjúkasta nakrantíð má vera tá eg hugdi vekk, í meðan eg havi skotið í mál.

**Hvat ger H71 til besta hondbóltsfelag í Føroyum?**
Tí fólkini í felaginum eru deiligastu fólk í verð.

J & K

## ÆTLAR TÚ AT STOYPA?

Tosa fyrst við okkum.

Framkomna, teldustýrda betong-blandiskipanin syrgir fyri, at tú kanst vera heilt vísur í, at tú fært betong av allarbestu góðsku bæði til nýtslu á landi og undir vatni
Blandi- og pumpubilar okkara bera so í bandi, at útkoyring og fylling í formar v.m. ikki er nakar trupulleiki - heldur ikki um tvørligt er at sleppa framat.

Vit koyra um alt landið og eru kappingarførir í prísi!



J & K

# J & K Betong

á Hjalla | Postboks 3179 | FO-110 Tórshavn | tel 31 50 60 | fax 31 41 94 | e-mail: jkp@jkp.fo | www.jkp.fo
Blandimeistarin tel 58 50 25




Grannskoðan // Ráðgeving // Bókhald // Roknskapur

Skalt tú meta
um framtíðina
mást tú
kenna fortíðina

WWW.JANUAR.FO

Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

SENDISTOVAN



# Takk fyri at tú stuðlar Javna

## Gerst limur í Javna

Far inn á okkara heimasíðu www.javni.fo, trýst á leinkjuna „Tekna teg sum lim“ og fylg vegleiðingini.

Hevur tú brúk fyri hjálp í sambandi við tilmeldingina, ring so til Javna á telefon 208090 ella 514827.

## Gerst stuðul hjá Javna

Ynskir tú at stuðla okkum við einari fastari upphædd hvønn mánað, far inn á heimasíðuna www.javni.fo og trýst á leinkjuna „Stuðulsgjald“ og fylg vegleiðingini.

Hevur tú brúk fyri hjálp í sambandi við tilmeldingina, ring so til Javna á telefon 208090 ella 514827.

javni

Hoydalsvegur 40/Loftið
FO-100 Tórshavn
Tel +298 20 80 90
javni@javni.fo
www.javni.fo





polytan®
simonsen@polytan.dk
tlf: 0045 39405420
far: 0045 26745420
polytan ligaturf 240/el-25
FIFA 2 stjørnu góðkent

# Er skeltingin í lagi?

Vilt tú síggja gott út, hava kundar í handilin ella bíleggingar til fyritøkuna, kann skeltingin gerast munurin millum at eydnast og ikki eydnast. Tað skal ikki altíð so nógv til, og tað nýtist ikki at kosta nógv.

**Hugsa stórt – hugsa Føroyaprent**



Á Føroyaprent hava vit eitt framkomið skeltiverkstað, har vit kunnu framleiða nærum alt, tú kanst hugsa tær.

- Lýsandi stavir á stórar bygningar
- Smá skelti sum t.d. navnaskelti til skrivstovuna
- Stórar plakatir og bannarar til tiltøkini í summar
- Foliuprent til veggir, vindeygu og bilin

Nethandil

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI 541 705

Føroyaprent
Tel. 31 45 55 www.foroyaprent.fo




RÁKIÐ



VIT GERA ALT BLIKK- OG RØRARBEIÐI

Alt til HITA SANITET & VENTILATIÓN

**Maria Poulsen & Co**

Smyrilsvegur 8 Postboks 182 FR-100 Tórshavn Tlf. 312000

www.torshavn.fo



Skapandi, mennandi, kveikjandi

TÓRSHAVNAR KOMMUNA




Ung í Eik
www.eik.fo/ung
Tel. 348000

Eik






TAKK, TIT SUM VITJAÐU

# UMAFTUR Í HOYVIKSHØLL




**20. februar** skipaði H71 á fjórða sinni fyri tiltakinum 80-ini umaftur í Hoyvikshøll. Eisini hesaferð var útselt. Fyrireikararnir fegnast um, at 80-arafjepparar úr øllum landinum taka so væl undir við tiltakinum. Sum skilst skipa bæði bindiklubbar, grannaløg, vinfólk sum heild fyri hugnakvøldum heima við hús hja onkrum teirra sum búleikast í Hoyvík. Higani gongur leiðin so í høllina. Dyrnar lata upp kl 23 – beinanvegin koma fyrstu gestirnir. Og um hálvgum-eitt tíðina er longu gott lív í høllini. Kombinatiónin av 80-aratónum frá Showmonnum og gestasangarum, umframt 80arahit-omaná-hit tykjast at sampakka væl. Dansigólvið livir allatíðina, og fólk tykjast at hugna sær.

Sum fyrireikari er hetta ómetaliga hugaligt. Jaligar vimerkingar faa vit i hópatali: „Hetta er SO skeeeeg … øll eru her!“ „Sjáldan havi eg sæð so mong í senn, sum eg ikki havi sæð í áratíggju.“ „Eg fekk slettis ikki tosað vi nakran – tí eg dansaði allatíðina og knapplig var bara liðugt!“ „Næstuferð koma vit fyrr í høllina – mugu fáa alt við“. Fyrireikararnir siga, at varhugin er, at just hesin málbólkur – hóast tey ikki ganga í býnum hvørt vikuskfti – so tíma tey avbera væl, ta okkurt serligt er. At ein kann gleða seg og skipa fyri einum rimmarkvøldi í goðari tíð, tað ger tað ikki verri.' Ein gestur orðaði seg soleiðis við fyrireikararnar um tiltakið: „Eg meini tað … hetta var sakin. Eg kendi fleiri her, enn eg geri, tá eg fari á ólavsøku!“

Gestir úr øllum landinum vitja Hoyvíkshøll hetta kvøldið – tað vita vit, tí atgongumerki verða seld um alt landið.

Sjálvandi vera 80-ini umaftur næsta ár. Dagurin er ikki settur enn – men eitt leygarkvøld í 2017, TAÐ er eitt gott boð.

Vit gleða okkum longu til 80-ini umaftur 2017. Vit síggjast – og hjartaliga takk øll tit glaðu, góðu fólk, sum settu tykkara dám á kvødlið og náttina við. Gleða okkum longu almikið at bjóða tykkum vælkomnum í Hoyvíkshøll komandi ár.




# 18 ÁRA STEYPAVINNARA TURKUR FARIN

**SEINAST VIT VUNNU STEYPAFINALUNA HJÁ MONNUM VAR Í 1998, TÁ VIT VIÐ HANS GUDMUNDSSYNI Á ODDA VUNNU STEYPAFINALUNA ÍMÓTI KYNDLI 24 – 20.**

*Liðin dagur líðilangur,*
*tagnaður var øksagangur,*
*økt var tal av kappagrøvum,*
*lokið stríð á Stiklastøðum.*

Hesar reglur runnu mær í hug, tá eg móður og troyttur, sunnukvøldið settist í stovuni heima í Hoyvík, at rinda møðina eftir langt og uppslítandi steypafinaluvikuskifti í hondbólti í Høllini á Hálsi. Ikki tí, sjálvur hevði eg ikki leikt, so slíkum var eg ikki móður av. Men heldur var tað henda uppslítandi sálarliga møðin, sum kemur yvir ein eftir út í eitt at hava verið so spentur so leingi. Sum áskoðari at standa við síðulinjuni og eygleiða dystin á vøllinum, er í mangar mátar strævnari enn at leika dystin sjálvur. Einki fært tú gjørt *(uttan kanska at royna at vegleiða dómararnir í at taka rættar avgerðir)* – tú kanst bert standa har og síggja hvussu leikur fer og vóna, at títt lið ber sigurin til hús.

Steypafinaluúrtøkan hjá H71 hetta vikuskiftið var heilt einastandandi. Ikki bara vunnu vit ein sannførandi steypafinalusigur í fremstu deildini hjá monnum, men vit at kalla volaðu eisini í teimum yngru deildunum. Soleiðis vunnu vit sjey av níggju finalum í yngru deildunum. Vit vunnu alla harra- og dreingjadeildina og vunnu tvær av fýra finalum í gentudeildini. Ja, í løtuni er støðan so, at tað kann næstan bert ganga niður á bakka.

Annars hevur H71 ikki tradition fyri at vera nakað steypafinalulið. Seinast vit vunnu steypafinaluna hjá monnum var í 1998, tá vit við Hans Gudmundssyni á odda vunnu steypafinaluna ímóti Kyndli 24 – 20. Og í 18




> ***Og so er tað eisini tað, at allar finalur eru opnir dystir, tú hevur eitt skot í byrsuni og mást nýta tað rætt í slíkari finalu***

ára tíðarskeiðnum síðani seinasta sigurin hava vit bert tvær ferðir leikt okkum fram til finaluna. Fyrru ferð var í 2004, tá vit við Hendrik Gerster á odda taptu fyri StÍF og seinru ferð í 2011, tá 2. lið okkara óvæntað leikti seg fram til finaluna við Halgir Dahl Olesen og Esbern Paturssyni við stýrisvølin, men mátti tá lúta fyri Neistanum.

So sigast má, at steypafinalusigurin hjá monnunum á Neistanum í vikuskiftinum kom væl við. Hyggja vit at stigatalvuni í landskappingini, so sluppu vit ikki undan onkursvegna at vera favorittar til dystin. H71 liggur heili 17 stig frammanfyri Neistan í landskappingini, vit á odda við 27 stigum og Neistin næstaftast við 10 stigum. Og er tað nakað sum H71 ikki trívist í, so er tað favoritrolluni. So nógv var gjørt burturúr at tosa seg burtur úr hesi støðu undan dystinum, men eydnaðist hetta bert partvíst. So ein var ikki sørt fjáltursstungin, tá farið var til dystin leygardagin. Ein hevði kensluna av, at H71 hevði alt at tapa og Neistin alt at vinna. Og so er tað eisini tað, at allar finalur eru opnir dystir, tú hevur eitt skot í byrsuni og mást nýta tað rætt í slíkari finalu.

Fremsta manslið hjá H71 byrjaði eisini dystin heldur trilvandi og tyktust leikarar okkara tungir á vøllinum. Serliga haltaði í verjupartinum, og ferð eftir ferð sluppu neistaleikarar framvið verjuleikarum okkara og skoraðu ella fingu brotskast. Eftir fyrsta korterið av dystinum var Neistin eisini á odda 10 – 7. Men eftir hetta tóku leikarar okkara




seg saman og settu alt uppá pláss. Fyrst var latið aftur í verjuni, serliga einum vælleikandi Tóraldi Kollskerð í málinum fyri at takka, og í álopinum kom somuleiðis meiri glið á. Farið varð soleiðis til hálvleiks við eini 13 – 12 leiðslu til H71. Tá komið var inn aftur til annan hálvleik, hildu H71 leikarar okkara áfram, har teir sleptu og øktu leiðsluna til 19 – 13, fyri síðani stilt og róligt at koyra sigurin 28 – 21 heim.

Ikki ein sinnisupprívandi og spennandi dystur, men heldur ein kontrollerað maktdemonstratión, ið ber boð um, at fremsta manslið okkara er um at vera aftur har teir vóru, tá leikárið byrjaði. Ein forloysandi sigur og løta – og skulu allir aktørar kring fremsta manslið okkara hava eina stóra tøkk fyri tað.

Men tað vit kanska ikki fingu í spenningi til finaluna hjá fremsta liði, góvu finalurnar í yngru deildunum okkum so sanniliga. Longu leygarkvøldið legði dreingir 18 lið okkara fyri og stóð sigrandi eftir í dysti ímóti Kyndli, har umdystur mátti til, áðrenn sigursharrarnir vóru funnir. Einastandandi raskir vóru dreingir okkara og bardust sum ein samlað eind fyri sigrinum. Dreingir 18 vildu vinna og gjørdu tað eisini.

Sunnudagin vóru vit í sjey ungdómsfinalum og vunnu allar uttan eina. Og allir sigrar vóru vunnir við einum máli og í tveimum førum mátti umdystur til. Haldi at eg kann loyva mær at siga, at ungdómsleikarar okkara allir trívast væl í tí pressi, sum altíð liggur á leikarum í tøttum finaludystum í fullsettari høll.

Í øllum dystunum vóru okkara leikarar smærri enn hinir leikararnir. Av tí sama máttu teir dúva uppá tekniskan holdbóltsførleika heldur enn kropsliga styrki, og í øllum dystum spældu vit okkum til sigrarnar við hondbóltskynstrum. Leikt var á høgum tøkniligum støði. Og satt at siga, so er ein ikki sørt errin av at síggja, hvussu væl er hilnast okkum í Hoyvík at skapa eina slíka flóðaldu innan hondbólti, sum í løtuni skolar inn yvir føroyska hondbóltsheimin.

Eitt ber hetta í øllum førum boð um, at okkurt hava vit gjørt rætt í Hoyvík.

# TÁ RÆTT SKAL VERA RÆTT

SENDISTOVAN



ADVOKATSKRIVSTOVAN

Halgir Winther Poulsen, adv.
Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Jógvan E. Winther Poulsen, adv.
Eyðbjørn Larsen, adv.
Birita S. Samuelsen, adv.

FRÚUTRØÐ 4 · POSTBOKS 6 · FO-110 TÓRSHAVN
TELEFON: (298) 35 33 35 · TELEFAX: (298) 35 33 36 · WWW.JURA.FO


Bilasolan.fo
Nýggi Audi A3 Sportback
Langt á odda.
Audi
Vorsprung durch Technik
Bilasølan
Vegurin langi, 359700


Altíð okkurt
sunt og gott
fast:
www.fast.fo

# h71 klæðini 2015/16



H71 INTERSPORT Thomas Dam Ítróttur adidas



Vælkomin inn á
gólvið hjá okkum
... her finnur tú
altíð okkurt!
pf Skálabúðin
DR. JACOBSENSGØTA · TEL. 315 315




Matstovur keypa gass
og køksútbúnað
frá
p/f Sveisingahandilin
Mykinesgøta 8 · FO-100 Tórshavn · Tel 311909




SKORA
VIÐ SISU
SISU
Föroya Bjór

FAROE SHIP

# SPEKT kann hjálpa tær við

Bókhaldinum

Roknskapinum

Lønarumsitingini

Sjálvuppgávuni

Kapitalvinnings-
sjálvuppgávuni

Rentustuðlinum

Útlendskum
skatti

Afturrindan
av mvg

Eftirlønum

SPEKT løggildir grannskoðarar Spf. · Staravegur 17
Postsmoga 3258 · 110 Tórshavn · Tel 34 34 34
Faks 34 34 35 · spekt@spekt.fo · www.spekt.fo

SPEKT | løggildir grannskoðarar

Gullpakkin við keypi av nýggjum bili

# Við Gullpakkanum vinnur tú hvørja ferð

**Tá tú keypir nýggjan bil frá Auto Service, fylgir Gullpakkin við, sum ger at tú sleppur undan at hugsa um útreiðslur til viðlíkahald og eftirlit av bilinum næstu trý árini.**





*Heðin Weihe, verkstaðsleiðari*

Visti tú av, at tú eigur, sambært framleiðaranum av bilinum, í minsta lagi einaferð um árið til eftirlit við bilinum fyri at varveita garantiið ?

Somuleiðis mást tú skifta olju í mun til, hvussu nógv tú koyrir, perur fara, sprinklaraveska skal fyllast á so hvørt, og so alt annað, so sum bremsur, útstoyt og stoytdoyvarar kunnu fara.

Alt hetta kann gerast til heilt fitt av peningi. Men við Gullpakkanum, sum fylgir við, fært tú alt hetta fyri einki..! Ja, í veruleikanum fært tú ein mekanikara við eykalutum í 3 ár ella til tú hevur koyrt 90.000 km, við í prísinum, tá tú keypir nýggjan bil frá okkum.

Vælkomin til eitt gott bilakeyp.



**Í Gullpakkanum fært tú:**

- Eftirliti og viðlíkahald av bilinum og harafturat allar neyðugar umvælingar
- Arbeiðsløn, eykalutir sum t.d. perur, viskarabløð og neyðugar veskur og viðlíkahalds- og umvælingararbeiði.
- Tað vil siga: **Ongar viðlíkahalds-útreiðslur komandi trý árini!**

Sí treytir á www.autoservice.fo

Undir Krákugjógv 19 - Postboks 3168 - 100 Tórshavn - Tel 34 54 00 - as@autoserice.fo

Auto Service
www.autoservice.fo

BYGMA
BALSLEV

Stuðlar ítróttini

SAMSKIP
Saman røkka vit málinum

yviri við Strond 23 – Postbox 3255 – Tel. 30 88 00 – Fax. 30 88 01 – www.samskip.com




SENDISTOVAN

amr.fo

# TEY SVØRTU TØLINI

## DYSTARYVIRLIT HJÁ H71 Í FTZ DEILDINI

| Dato | Heimalið | Útilið | Úrslit |
|---|---|---|---|
| 23.09.2015 | H71 | Neistin | 27-16 |
| 26.09.2015 | H71 | StÍF | 25-22 |
| 04.10.2015 | VÍF | H71 | 25-30 |
| 11.10.2015 | H71 | T. Klaksvík | 31-23 |
| 15.10.2015 | Kyndil | H71 | 22-25 |
| 01.11.2015 | KÍF | H71 | 20-25 |
| 11.11.2015 | StÍF | H71 | 21-27 |
| 15.11.2015 | H71 | VÍF | 28-24 |
| 18.11.2015 | Neistin | H71 | 16-26 |
| 21.11.2015 | T. Klaksvík | H71 | 24-37 |
| 29.11.2015 | H71 | Kyndil | 29-24 |
| 13.12.2015 | H71 | KÍF | 24-19 |
| 16.12.2015 | H71 | StÍF | 21-22 |
| 19.12.2015 | Neistin | H71 | 20-20 |
| 06.01.2016 | VÍF | H71 | 19-17 |
| 09.01.2016 | H71 | T. Klaksvík | 38-21 |
| 17.02.2016 | H71 | Kyndil | 26-26 |
| 28.02.2016 | KÍF | H71 | 18-18 |
| 06.03.2016 | H71 | Neistin | |
| 13.03.2016 | StÍF | H71 | |
| 19.03.2016 | H71 | VÍF | |
| 23.03.2016 | T. Klaksvík | H71 | |
| 03.04.2016 | Kyndil | H71 | |
| 16.04.2016 | H71 | KÍF | |

## STØÐAN FTZ DEILDIN

| Nr. | Lið | Dystir | V.m | T.m. | Munur | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | H71 | 18 | 474 | 382 | 92 | 29 |
| 2 | VÍF | 18 | 484 | 453 | 31 | 24 |
| 3 | Kyndil | 18 | 485 | 438 | 47 | 21 |
| 4 | KÍF | 18 | 425 | 401 | 24 | 20 |
| 5 | StÍF | 18 | 475 | 467 | 8 | 18 |
| 6 | Neistin | 18 | 440 | 453 | -13 | 14 |
| 7 | T. Klaksvík | 18 | 412 | 601 | -189 | 0 |

# LIÐINI HESUFERÐ

## H71

**Málmenn:**

1 Ári E. Dam
12 Tóraldur Kollsker
16 Johan Hofgaard

**Útileikarar:**

2 Rasmus Rasmussen
3 Mark Lausen Marcher
4 Rúni V. Højgaard
6 Djóni Vest Højgaard
7 Eindri Frýdal
8 Pætur Thomsen
11 Hans Kári Hansen
13 Oddur Bech
14 Sigmundur Dahl
15 Sigmundur Nolsø
18 Andor Sivertsen
22 Helgi Hoydal
23 Hilmar Leon Jakobsen
45 Peter Krogh
89 Jónas Djurhuus
99 Tróndur Arge

*Venjarar:*
**Petur Mittún**
**Halgir Dahl Olesen**

*Málmansvenjari:*
**Jens à Skipagøtu**

*Liðleiðarar:*
**Petur Sivertsen**
**Rene Dahl Olesen**
**Andras Marr Poulsen**

## Neistin

**Málmenn:**

1 Bjørn M. Mohr
16 Nicholas Satchwell

**Útileikarar:**

3 Julian Lava
6 Rasmus Muller
7 Andras Joensen
9 Rói Berg Hansen
10 Sjúrður K. Thomassen
11 Herbjørn Lava
17 Pætur Mikkjalson
19 Hjalti í Jákupsstovu
21 Torkil Hentze
24 Terji Mørk
49 Jugoslav Djumic
79 Teis H. Rasmussen

*Bonkur:*
**Scott Harrington**
**Ári Rouch**
**Torstein Balle**



# »GOTT ER AT HAVA GÓÐAN Í RÁÐUM«



## ADVOKATFELAGIÐ VIÐ STROND 4

YVIRI VIÐ STROND 4 · TEL 203040 · FAX 203041 · P.O. BOX 359
FO-110 TÓRSHAVN · FAROE ISLANDS
LAWFIRM@LAWFIRM.FO
WWW.LAWFIRM.FO

JÓGVAN PÁLL LASSEN · PETUR EVEN DJURHUUS
JÓGVAN E. ELLEFSEN · ANNA DAM · INGI HØJGAARD
GUNN ELLEFSEN · MIMI STEINTÓRSDÓTTIR
JULIANNA KLETT